# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Bukaðir heimsmeistarar

**Feinschmäcker'arnir fingu sín vilja, tá hollendska pasningsspælið sendi tríggjar bóltar handan heimsins besta málverja, tá heimsmeistaranrir fingu bank**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Bólturin var trupul og vinkulin nærum ógjørligur. Men framúr sparkiteknikkurin hjá Sneijder stóð sína roynd, tá hann bankaði bóltin í netið til hollendska 2-0 leiðslu*

*Mynd: Polfoto/AP*

Talan var um sannan avsmurning, sum Italia rendi seg í á vøllinum á Stade de Suisse Wankdorf, tá Holland var mótstøðuliðið mánakvøldið.

Í deyðsbólkinum, sum eisini telur Frakland og Rumenia, er trýstið á liðunum stórt, og tað gjørdist ikki minni hjá Donadoni og hansara monnum, sum nú standa við ongum stigi og einum vánaligum málmuni.

## Fortuna spældi við

Og Holland var betra liðið. Eingin ivi um tað. Longu undan leiðslumálinum høvdu teir fleiri ferðir góðan møguleika at leggja seg á odda, og hóast teir leingi vóru á odda 2-0, so var talan alla tíðina um skilagott verjuspæl við hvøssum kontrabroddi, soleiðis at Italia ikki tordi at tveita ov nógv fólk fram á vøllin.

Men tá tað er sagt, so skerst ikki burtur, at hollendingar als ikki vóru óhepnir í teimum støðunum, sum førdu til málini.

Dómarin metti helst, at italskur verjuleikari, sum var staddur aftan fyri baklinjuna, gjørdi sítt til at spæla van Nistelrooy onside, og var hetta rætt, so var málið lógligt. Men tað vildi neyvan verið nakar, sum hevði mótmælt, um linjuverjin hevði veittrað Nistelrooy rangstaddan í støðuni. Og so kundi hollendski landsliðsvenjarin, van Basten, kanska halda, at tað var lagnunnar speisemi, meðan sjónvarpsmyndirnar frá einum kolldømdum EM-málið móti Russlandi í 1992 tónaðu fram á nethinnu hansara.

Italia var eisini við í dystinum, og ein av teimum heilt góðu møguleikunum høvdu teir, beint áðrenn næsta hollendska málið. Royndin varð tó bjargað á málstrikuni av van Bronckhorst, sum síðani sjálvur setti ferð á. Talan var um framúr kontraálop, har van Bronckhorst skifti langt til Kuyt, sum stútaði inn til Sneijder, sum sera varkurt flutkaði bóltin í meskarnar.

Og eisini høvdu italiumenn orsøk at iðra seg, tá triðja málið fall. Italia satsaði loksins, og talan gjørdist um einstakar góðar møguleikar at skapa spenning í aftur. Ein hesum førdi til frí-spark stutt uttan fyri brotsteigin. Hesa ferð var eydnan tó ikki við Pirlo, sum bankaði bóltin á stólpan, og so gekk skjótt hinvegin. Somikið skjótt, at van Bronckhorst kundi seta eitt vakurt punktum, tá hann stútaði bóltin inn um Buffon.

# Van Basten var errin

**Í Milan stóðu teir lið um lið á stórliðnum seinast í 80'unum og fyrst í 90'unum. Men í gjárkvøldið var tað sum dagur og nátt at síggja van Basten og Donadoni**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hollenski landsliðsvenjarin, Marco van Basten, var ein errin maður, tá hansara lið fyri fyrstu ferð í trý áratíggju hevði vunnið á Italia.

- Eg eri sera errin av mínum liði. Vit hava vunnið á Italia – heimsmeistarunum. Og hetta er ein søguligur sigur, tí eg haldi ikki, at tað er komið fyri fyrr, at Holland hevur vunnið 3-0 á Italia.

Undir HM-kappingini í Týsklandi gjørdist vátt í reiðrinum millum van Basten og hollendsku álopsstjørnuna, van Nistelrooy, sum als ikki varð úttikin í eitt ár. Júst Nistelrooy skoraði fyrsta hollendska málið, men van Basten vildi tó ikki leggja alt ov nógv í gamla stríðið.

- Eg eri ein sera fegin maður, tí liðið spældi sum eitt lið. Vit manglaðu eisini ein spælara sum Robben, men liðið stríddist bara tað meira, var tað, sum venjarin vildi siga um hetta.

## Off-dagur

Lagið hjá Roberto Donadoni var sjálvandi ikki eins gott, sum tað var hjá fyrrverandi liðfelaganum í Milan.

- Vit høvdu ein off-dag. Dysturin byrjaði illa, og hann endaði ræðuligt fyri okkara viðkomandi. Tí sjálvandi ynskir eingin at byrja eitt endaspæl við at tapa 3-0, segði Donadoni.

- Eg var ikki tikin av bóli av álopsspælinum hjá Hollandi. Teir spældu júst soleiðis, sum vit roknaðu við. Men fyrsta málið ger tað trupult hjá okkum, og við næsta málið eru vit ov naivir við ov nógvum fólki frammi á vøllinum. Eg haldi tó, at vit stríddu okkum væl aftur í dystin, men hetta var bara ikki dagurin, segði Roberto Donadoni.

# Floytandi áskoðarar

**Fronsku viðhaldsfólkini vóru alt annað enn nøgd, eftir at Frakland og Rumenia spældu higar til keðiligasta dystin í EM**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá óttin at tapa gerst størri enn viljin at vinna, verður talan sjáldan um nakra stóra fótbóltsupp-living.

Og tað varð tað heldur ikki í Zürich, tá Frakland og Rumenia hittust í fyrsta dystinum í deyðsbólkinum, sum bólkur C verður róptur.

Tá 90 minuttir vóru spældir, stóð framvegis 0-0 á talvuni, og tað vóru tað fá, sum veruliga kundu mótmæla. Sæð burtur frá einstøkum vandamiklum deyðsbóltsstøðum og onkrari hissini skotroynd, so hendi ikki tað heilt stóra í dystinum. Mest øsand løturnar vóru helst, tá dómarin fýra ferðir valdi at brúka gula kortið.

Báðir partar vildu fyri alt í verðini sleppa undan at tapa fyrsta dystin, og sum so kunnu liðini væl vera nøgd um javnleikin. Men tað vóru áskoðararnir so ikki, og tað kom ljóðliga fram, tá dómarin hevði bríksláð fyri seinastu ferð.

---

## EM-dystir

**Bólkur C**
**Rumenia-Frakland 0-0**
**Holland-Italia 3-0 (2-0)**
1-0: Ruud van Nistelrooy, 26.
2-0: Wesley Sneijder, 31
3-0: Giovanni van Bronckhorst, 80.

**Komandi dystir**
**Bólkur D**
10.06 17.00 Spania-Russland
10.06 19.45 Grikkaland-Svøríki

**Dagur Kl. Dystur**
**Bólkur A**
11.06 17.00 Kekkia-Portugal
11.06 19.45 Sveis-Turkaland